MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi til Mentamálaráðið

**Áhugavert og fjølbroytt avloysarastarv sum fulltrúi er leyst at søkja í Mentamálaráðnum. Starvið er tíðaravmarkað í 3 ár, t.v.s. fram til 31. juli 2022**

**Starvið**
Sum fulltrúi í Mentamálaráðnum verða uppgávur tínar áhugaverdar og fjølbroyttar. Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru í løtuni innan skúlaøkið, eitt nú sernámsfrøðiliga økið í og kring skúlaverkið, trivnaðarøkið umframt yrkis- og vinnuútbúgvingarøkið.

Talan er um eitt starv í einum spennandi politiskum arbeiðsumhvørvi, og skalt tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti. Neyðugt er at tola broytingar

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving frá hægri lærustovni ella aðra viðkomandi útbúgving og royndir, sum kunnu javnsetast. Tað er ein fyrimunur at hava royndir og innlit innan føroyska skúlaverkið, serliga fólkaskúlan og innan sernámsfrøði, umframt almenna námsfrøði og skúlaskap yvirhøvur.

Tú skalt duga væl at orða teg á føroyskum og donskum, bæði í skrift og talu, umframt hava góðar førleikar í enskum. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og í toymi og arbeiðsbólkum. Tú skalt vera tænastusinnað /-ur, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Tú skalt hava førleika at seta teg inn í nýggj viðurskifti og duga at miðla hetta víðari til onnur. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum í síni heild.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Starvið er tíðaravmarkað til 31. juli 2022.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um øll stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við telduposti til: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 16. august 2019**. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 555010 ella t-post PoulGeertH@mmr.fo.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita málsøkini, útbúgving, savnsøkið, gransking og mentan, herundir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál og onnur trúarsamfeløg, loftmiðlar, ítrótt og annað frítíðarvirksemi. Sí heimasíðu Mentamálaráðsins www.mmr.fo, ið verður dagførd í løtuni.*